# Ferðaætlanin skal broytast



**– Talan er um økisoyðing í verki, og hetta fer at fáa avleiðingar, sigur Hergeir Nielsen, Landsstýrismaður**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður krevur nú, at Ferðaætlanin hjá Smyrli ímillum Havnina og Suðuroy, verður broytt.

Tað er serliga túrurin av Drelnesi til Havnar, hóskvøld, sum hann hugsar um.

Hetta er ein túrur, sum burturav er lagdur fyri at geva fiskasvirkjum í Suðuroy møguleikan at avskipa fiskin við Norrønu hóskvøld.

Túrurin hevur verið sigldur klokkan 19 hóskvøld, men í nýggju ferðaætlanini er hann fluttur hálvan annan tíma fram, til kl. 17.30.

Og tað er hetta, sum løgtingsmaðurin finnist at.

– Túrin norður av Drelnesi tórsdag seinnapart havi eg gjørt tykkum varugar við fleiri ferðir í orð og tal, undir orðaskifti á tingi og í samskifti við landsstýrismannin, sigur Hergeir Nielsen í skrivi, sum hann áður hevur hevur sent Strandferðsluni og sum hann nú sendir bløðunum.

Hann sigur, at við at flyta túrin fram, ger Strandferðslan kortini enn eina roynd at sigla undan útflutningsvøruni, sum tit við vissu vita ikki er klár til avskipingar fyrr enn kl. 19.

– Talan er um økisoyðing í verki, og hetta fer at fáa avleiðingar, sigur hann

– Tí kunnu tit líka so væl fyrr sum seinni ganga í tykkum sjálvar, og lata vera við at broyta fráferðina av Drelnesi tórsdag. Tíðin er nóg trong, sum er.

– Vónandi stendst ikki størri hávi av hesi ætlan, enn neyðugt erm endar løgtingsmaðurin skrivið til Strandferðsluna.

### Villleiðandi upplýsingar

Annars fýlist hann á, at Strandferðslan meiri enn eina ferð í seinastuni hevur givið ferðafólki, sum skulu ímillum Suðuroy og Havnina, villleiðandi upplýsingar

Eitt dømi var annan hvítusunnudag. Tá varð lýst á heimasíðuni hjá Strandferðsluni, at Smyril skuldi sigla av Drelnesi kl. 6 og kl. 17.30

– Her er sostatt eingin lýst broyting suðurgangandi.

– Annar hvítusunnudagur er mánadagur, og tá er fráferð sambært ferðaætlanini úr Tórshavn kl. 12.30 og 19.00.

– Smyril sigldi kortini kl. 10, ella 2 1/2 tíma undan lýstari fráferð.

– Talan er um villeiðing av ferðafólki, og fleiri fóru tíverri nakkalong heimaftur til húsa av Busatanga á middegi í dag, mánadagin 20. mai 2002 , sigur Hergeir Nielsen í skrivi til Strndferðsluna nú eftir Hvítusunnu.

Hann vísir eisini til fráferðina mikukvøldið, sum varð avlýst fyri veður.

Sjálvur var hann staddur á á Bursatanga mikukvøldið kl. 20.

– Eingin fráferð var hjá Dúgvuni, so sum lýst varð. Heldur einki tilboð til teirra, ið villeidd vóru, so sum matur, gisting ella líknandi.

– Soljóðandi lýsing er á heimasíðuni hjá Strandferðsluni 22. mai 2002: "Fyri veður, verður seinasti túrurin av Havnini til Suðuroyar í kvøld avlýstur. Um viðrar, siglir Dúgvan aftur av Havnini í morgin áðrenn kl 10:00"

– Hildið verður, at tað hevði verið skilagott at skriva, nær Dúgvan siglir í staðin fyri at skriva, at hon siglir áðrenn kl. 10 - tað kann jú vera nær sum helst, sigur Hergeir Nielsen í skrivi til Strandferðsluna.




Leygardagin 25.05 hava vit opið frá kl. 11.00 til 17.00

Í hesum sambandið hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi:

Upp til 15.000 kr. í avsláttri

| | | |
|---|---|---|
| Citroen Jumper CH. v/last<br>km. 120.000, árg. aug. 1998<br>130.000,- | Mitsubishi L300 2,5D<br>km. 161.000, árg. juni 1994<br>70.000,- | Ford Sierra 2,0i CLX 4h<br>km. 110.000, árg. nov. 1991<br>45.000,- |
| Citroen Xsara 1,6i 5h<br>km. 30.000, árg. feb. 1998<br>107.000,- | Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5h<br>km. 145.000, árg. mai 1992<br>sýnaður 08'00 52.000,- | Hyundai Accent 1,3 LS 5H<br>km. 65.000, árg. feb. 1999<br>75.000,- |
| Citroen Xsara 2,0 HDi Stc. 5H<br>km. 83.000, árg. juni 1999<br>140.000,- | Mitsubishi Lancer 5h<br>km. 124.000, árg. juni 1992<br>sýnaður 12'01 50.000,- | Peugeot 306 D 4H<br>km. 150.000, árg. apr. 1995<br>80.000,- |
| Citroen ZX 1,9D 5H STC<br>km. 89.000, árg. mars 1996<br>86.000,- | Fiat Tipo 5H<br>km. 109.000, árg. mai 1989<br>sýnaður 11'01 23.000,- | Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h<br>km. 35.500, árg. aug. 1999<br>115.000,- |
| Mitsubishi L300 2,5D<br>km. 161.000, árg. juni 1994<br>70.000,- | Ford Escort 1,8D CLX 4h<br>km. 187.000, árg. nov. 1995<br>sýnaður 06'01 45.000,- | Toyota Camry<br>km. 143.000, árg. jan. 1987<br>20.000,- |

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar

www.ivan.fo

Sosialurin - 311820




# Tvøroyrar Býráð ikki loyvi at stongja havnina

**– Løgmansskrivstovan hevur sett avgerðina hjá Tvøroyrar Býráð um at nokta Dúgvuni atløgupláss úr gildi fyribils**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Ein fyribils niðurstøða hjá Løgmansskrivstovuni er, at Tvøroyrar Býráð ikki kann nokta Dúgvuni atløgupláss á Tvøroyri. À myndini, sum er tikin á býráðsfundi fyrr í mai mánaða, var Dan Nielsen ikki á fundi. Hinir Býráðslimirnir eru f.v. Bergur Bærentsen, Heri Mortensen, Pauli Einarsson, Kristin Michelsen, Sverri Midjord og skrivarin, Óli Debes. Býráðsformaðurin, Finnleif Guttesen, stendur*

Tvøroyrar Býráð hevur ikki heimild til at nokta Dúgvuni atløgupláss á Trongisvágsfirði.

Tað er fyribils niðurstøðan, sum Løgmansskrivstovan er komin til.

Tað var longu í 1996, at Tvøroyrar Býráð noktaði at geva Dúgvuni atløgupláss á Tvøroyri, tí Byráðið kravdi at fáa hóskandi avloysaraskip fyri Smyril, tá ið hann skuldi í dokk.

Áður hevur tað ongantíð verið upp á tal at seta samtyktina í verk, tí tað er ongantíð komið hartil, at Talan hevbur verið um at Dúgvan skuldi røkja suðuroyarsiglingina

Men mikudagin hendi so tað, at onki skip er at seta í suðuroyarsiglingini, uttan júst Dúgvan og tí tók Tvøroyrar Býráð málið uppaftur mikudagin.

Og har varð einmælt viðtikið, at samtyktin frá 1996 skuldi standa við.

Men hetta vildi Vinnumálastýrið ikki góðtaka uttan víðari og heitti tí á Løgmansskrivstovuna um at kanna, um Tvøroyrar Kommuna yvirhøvur hevði heimild at nokta Dúgvuni at leggja at á Tvøroyri, tí við hesum forðar Býráðið Strandferðsluni í at røkja sínar lógarásettu skyldur um fólka og farmaflutning.

Og tað var skjótt, at Løgmansskrivstovan gjørdi ein fyribils úrskurð í málinum og hann er, at Tvøroyrar Býráð hevur ikki loyvi at nokta Dúgvuni atløgupláss.

Sambært kommunulógini hevur Løgmansskrivstovan tí gjørt av, at samtyktin hjá Tvøroyrar Býráð skal setast í gildi fyribils.

Og hendan avgerðin hjá Løgmansskrivstovuni stendur til, til hon hevur kannað málið nágreiniliga og kemur til eina endaliga niðurstøðu

# Vit eru ongantíð komin yvir søluna av Teistanum

**Henrik Old, løgtingsmaður fyri Suðuroynna sigur, at eitt tað fyrsta, sum nývalda Løgtingið má gera, er at fáa skil á Suðuroyarsiglingina**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

– Trupulelikarnir, sum nú eru við at koma allari Suðuroynni, hava sín uppruna í tí vanlukkuligi avgerðini, sum varð tikin í 1996 um at selja Strandfaraskipið Teistan.

Henrik Old, Løgtingsmaður fyri Suðuroynna, sigur. at Suðuroyggin er ongantíð komin yvir søluna av Teistanum.

– Síðani Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvsstýrisflokkurin seldi Teistan, hevur verið ruðulleiki í suðuroyarsiglingini, tí ongi hóskandi avloysaraskip hava verið fyri Smyril, tá ið hann hevur verið í dokk.

– Og tað bløðir Suðuroyggin enn fyri.

Men Løgtingsmaðurin gevur ikki Strandferðsluni skyldina.

– Í hesum føri hevur Strandferðslan onki val, uttan at seta Dugvuna í Sigling. Gjørdi hon ikki tað, var onki skip yvirhøvur.

– Strandferðslan kann ikki lastast fyri óskilið. Tað er einans Føroya Løgting, sum kann lastast, tí Løgtingið vil ikki játta Strandferðsluni nóg mikið av pengum rættstundis.

– Javnaðarflokkurin skeyt í fjør upp at keypa eitt avloysaraskip, men t að fall í Løgtinginum.

Hann sigur, at tað er ikki, fyrrenn á nýggjárinum at Strandferðslan veit, hvat hon hevur at arbeiða við tað komandi árið og tá er alt ov seint at finna hóskansi avloysaraskip.



*Tað er ikki Strandferðslan, men bara Løgtingið, sum hevur ábyrgdina av ruðulleikanum í siglingini ímillum Havnina og Suðuroy, sigur Henrik Old, Løgtingsmaður*

– Tá eru ongi skip eftir á marknaðinum uttan tað skramblið, sum ongin annar vil hana, sigur Henrik Old.

Hann vísir eisini á, at ongin kann siga, at Løgtingið ikki kendi trupulleikan.

– Tað var longu í september, at Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, gjørdi vart við trupulleikan, men kortini vildi meirilutin av Føroya Løgtingið ikki taka neyðug stig.

Hann sigur, at tískil verður tað ein av fyrstu uppgávunum, sum nývalda Løgtingið má undir, at finna eina varandi loysn á Suðuroyarsiglini, so at hetta ikki hendir aftur.

– Antin má avloysaraskip keypast, ella má Strandferðslan í góðari tíð fáa játtan, so at hon fær høvið at finna eitt hóskandi avloysaraskip.

Suðuroyarsiglingin:

# Óskilið eigur at fáa avleiðingar

**Hergeir Nielsen, løgtingsmaður fyri Suðuroynna, heitir nú á Løgmann um beinanvegin at taka neyðugar politiskar og umsitingarligar avgerðir, sum kunnu loysa trupulleikarnar við flutningi um Suðuroyarfjørð**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*– Landsstýrismaðurin eigur at taka avleiðingarnar av trupulleikunum við suðuroyarsiglingini, sigur Hergeir Nielsen*

– Tað er skilligt, at landsstýrismaðurin ikki umsitur málsøkið sítt á fullgóðan hátt, og eigur hann tí at taka avleiðingarnar av hesum.

Nøkunlunda soleiðis málber Hergeir Nielsen, løgtingsmaður fyri Suðuroynna seg í einum skrivi, hann mikudagin sendi Løgmanni um ruðulleikan sum valdar í siglingini ímillum havnina og Suðuroynna.

Løgtingsmaðurin sigur, at hann tekur fult undir við teimum suðuroyingum, sum mótmæla støðuni og nú heitir hann á løgmann um at leggja upp í málið.

Í skrivinum til Løgmann sigur hann, at játtanin til Strandfaraskip Landsins er økt 50% seinastu fýra árini, og sambært uppskoti til løgtingsfíggjarlóg fyri 2002 hevur Landsstýrið kunnað Løgtingið um, at Tvær milliónir krónur av samlaðu játtanini upp á 70 milliónir krónur, eru settar av til at leiga avloysaraferju fyri

– Harafturat hevur løgtingið játtað 310 milliónir til at byggja av nýggja Suðuroyarferju fyri.

– Kortini uppliva vit álvarsligar, støðugar og afturvendandi trupulleikar á Suðuroyarleiðini, og upplýst verður av strandferðslustjóranum, at hesir trupulleikar stava frá tørvandi játtan til at reka stovnin fyri, sigur Hergeir Nielsen.

Alment verður boðað frá, at stovnurin ikki er førur fyri at lúka høvuðsuppgávuna í reglugerðini fyri stovnin, sum er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmafluttningi.

### Eigur at fáa avleiðingar

Hergeir Nielsen sigur, at Løgtingið er hinvegin ikki kunnað um annan tørv á játtan til avloysaraferju enn tær tvær milliónir krónurnar, ið játtaðar eru, og hevur tí ikki havt umstøður til at taka aðrar avgerðir enn tær, ið tiknar eru.

– Suðuroyggin hevur ligið avbyrgd í fýra vikur vegna verkfall, har tað almenna var annar parturin, og komandi vikurnar eru útlit til, at tað almenna einsamalt fer at avbyrgja Suðuroynna.

Hann sigur, at tá ið løgtingið ikki er kunnað um, at ovurstóru avleiðingarnar fyri hetta samfelagsøkið standast av ov lítlari játtan, og tá ið landsstýrismaðurin, ið hevur ábyrgd av málsøkinum, ikki letur við seg koma, er skilligt, at landsstýrismaðurin ikki umsitur málsøkið sítt á fullgóðan hátt, og eigur hann tí at taka avleiðingarnar av hesum.

Landsstýrismaðurin, ið sipað verður til, er Bjarni Djurholm, sum umsitur Strandferðsluna.

– Heitt verður tí á løgmann um beinanvegin at taka neyðugar politiskar og umsitingarligar avgerðir, sum kunnu loysa bráðkomnu trupulleikarnar við flutningi um Suðuroyarfjørð, sigur Hergeir Nielsen.